# UNGMANNAFEL SETA FOKUS Á SAMKYND



**SAMKYND OG ÆTTLEIÐING** Unga Tjóðveldi, Sosialistisk Ung og Ungmanafelag Sambandfloksins eru samd um, at samkynd skulu hava somu rættindi sum øll onnur, eisini at ættleiða børn. Huxa letur upp til einstaka nevndarlimin at hava sína egnu hugsan um etisk mál

Leo Poulsen

Seinastu tíðina hava ungmannafeløgini hjá trimum av teimum fýra stóru politisku flokkunum verið frammi og sagt sína hugsan um samkynd og teirra rættindi.

Á heimsíðuni hjá Mess hava formenninir í Sosialistisk Ung, Bergur Arnbjarnarson Dalsgarð, Gunhild Dahl Niclasen í Unga Tjóðveldi og Katrin Hovland Petersen, virkandi formaður í Unga Sambandinum, úttalað seg um rættin hjá samkyndum at ættleiða. Tey eru øll samd um, at samkynd skulu hava somu rættindi sum onnur, hesum viðvíkjandi.

Hinvegin hevur HUXA, politiska ungmannafelagið hjá Fólkaflokkinum, ikki viðgjørt málið, og fer neyvan at gera tað heldur.

- Tá tað kemur til tey etisku málini hava vit ta støðu, at tað er upp til hvønn einstakan at hava sína egnu sannføring. Tí hvørki kann ella vil eg úttala meg vegna felagið, sigur Hanus Samróð, formaður í HUXA.

Sosialurin setti teimum fýra formonnunum í ungmannafeløgunum hjá teimum stóru politisku flokkunum stevnu og spurdi, hví kjakið um samkynd og teirra rættindi hevur stungið seg upp beint nú.

– Tað kemst av, at danska Fólkatingið hevur samtykt eina kynsneutrala hjúnarbandslóggeving, so at samkynd og hinkynd pør verða javnsett, sigur Bergur Dalsgarð, ið er tann, ið fyrstur setti fokus á málið.

## Ber umrøtt innanhýsis

– Málið kom fram í Mess, og vit mettu tað neyðugt at hava eina greiða støðu til málið, sigur Katrin Petersen, virkandi formaður í Unga Sambandinum.

Eisini Sosialistisk Ung hava viðgjørt málið í nevndini.

– Vit í Unga Tjóðveldi gjørdu eisini skjótt av og viðgjørdu málið beint eftir, at greinin hevði staðið á heimasíðuni hjá Mess. Og vit taka undir við, at samkynd skulu kunna ættleiða, sigur Gunhild Niclasen, formaður í Unga Tjóðveldei.

Einki av teimum trimum politisku ungmannafeløgunum, sum hava viðgjørt hetta málið, hava tó umrøtt hetta við floksleiðslurnar.

– Nei, tað hava vit ikki gjørt, men eg kann siga so mikið, at taka tey ikki undir við okkum í hesum málinum, so má tað verða harvið. Vit hava í hvussu er eina greiða støðu, sigur Katrin Petersen.

Bergur Dalsgarð er samdur við formanninum í Unga Sambandinum.

– Vit hava heldur ikki umrøtt málið við floksleiðsluna, men hóast vit vóna, at hon tekur undir við okkum vil tað altíð verða soleiðis, at vit í Sosialistisk Ung altíð fara at hava okkara egnu meiningar, sigur hann.

Eisini í Unga Tjóðveldi eru tey samd um, at gott hevði verið at tikið málið upp við floksleiðsluna.

– Tað hevði verið eitt gott hugskot at tikið málikð upp við floksleiðsluna, og eg rokni við, at har eru fleiri, sum taka undir við okkum. Tað vóni eg í hvussu er, sigur Gunhild Niclasen.

## Skrásett parlag

Hanus Samróð vísir á, at HUXA hevur eitt gott samband og ein góðan dialog við floksleiðsluna, men slær fast, at tá tað kemur til tey etisku málini, stendur øllum frítt at hava sína egnu hugsan.